gult18 cyan18 magenta18 svart18

EG MEINI TAÐ

CO2

Sonne Smith, útvarpsmaður á Rás2

Handa yvirskriftin hevði verið snøggari, hevði eg havt skrivað koltvísúrni, ella vakstrarhúsgass, sum vit eru farin at kalla tað eisini.

Eg havi mangan hugsað um okkum sjálvi. Vit, sum teljast millum heimsins ríkastu og mest forkelaðu fólk. Vit, sum brúka og tveita burtur. Tveita burtur, tí vit keypa bara nýtt. Her manglar einki. Vit, sum hava hall á handilsjavnanum, tí vit flyta sjálvt vatn inn. Tað kom sjálvandi væl við í fjør summar, tá ið vit vóru fyri veruligum skerpingi. Tað hendir við hvørt. Her í Havn noyddust vit at drekka klorað vatn, og tað smakkaði illa. Tað innflutta vatnið úr Harilds keldu í Danmark var útselt! Ja, útselt! Og nú er aftur nógv vøra útseld, tí arbeiðararnir eru so óforskammaðir at fara í verkfall. Hvat billa teir sær inn? At fara í verkfall so at vit onnur koma í dýrastu neyð, tí vit millum annað ikki fáa brúkt alt tað, sum vit kundu keypa, áðrenn arbeiðararnir vóru so frekir at fara í verkfall. Tað er landaskomm, vanæriligt, ræðuligt. Vit fáa kanska heldur ikki keypt bensin fyri teimum. Bara nú ikki hini síggja okkum fara til gongu. Vit, sum hava so ring knø, eru so ring av áraknútum og hava so ringan rygg.

Vit kunnu ikki góðtaka Kyoto-avtaluna, tí oljuvinnan er her. Oljan er næstan her. Altso mugu vit biðja Danmark um undantaksloyvi, tí annars sleppa tey stóru útlendsku oljufeløgini ikki at bora eftir oljuni, sum Atli Dam lumpaði frá Poul Schlüter. Vit eru í somu støðu sum teir neyðars amerikanararnir. Ella hvat? Nei, einki eru teir neyðars amerikanarar, tí George W. Bush legst nú á eitt friðað øki í Alaska at bora eftir olju og gassi. Fýra prosent av seks milliardum fólkum í verðini brúka sum er ein fjórðing av allari heimsins orku. Og tað er alt ov lítið hjá teimum. Tað segði ein 91 ára gomul kalifornisk kona fyri ikki so langari tíð síðan á einum fundi í Kaliforniu. Hon visti, hvat hon tosaði um, tí spekulantarnir høvdu otað seg longri og longri inn á eitt nú hennara lívsfriðaða øki, har hon býr og hevur livað væl. Á fundinum segði hon: (tað eru ikki míni orð, men eg haldi við henni)

– »Vit eru ein tjóð, ið er spilt av yvirflóð, keða okkum við landsins ríkidømi og fitna av keðseminum. Vit eru eitt fólk ikki av hugskotum, men av upplopi. Vit eru eitt fólk, ið er hypnotiserað av tí upplopi, at vit vita, hvat ið er gott fyri verðina, hóast vit í roynd og veru ikki vita, hvat ið er gott fyri okkum sjálvi. Miðal amerikanska húskið hyggur í sjónvarp í sjey tímar um dagin. Sjónvarpsleiðararnir verja sítt svass við, at teir geva okkum 'tað fólk vil hava.' Medellin Kartellið selur okkum 'tað fólkið vil hava.' Forsetin fortelur okkum, í sjónvarpinum, at vit mugu støðga innrásini av narkotika, tí tað er tað, 'fólkið vil hava.' Lat meg siga tykkum eitt: Fólk hava alt. Vit eru savnarar, kraddarar, slúkar, pírar. Vit kaliforniarar framleiða meiri rusk í part enn nakar annar statur í tjóðini, enn nøkur onnur sivilisasjón í jarðarinnar søgu. Men vit vilja hava meira. Vit vilja hava ting, ið ikki eru til enn. Ja, tað vilja vit eisini hava.«

Konan, sum eitur Doris, hevur krøkt samkomuna við sínum eygnabrái.

»Hví? Tí tað var her. Eitt ófatililgt ríkidømi – eitt hav, sum ýddi av fiski, endaleysir dalar við fruktagóðari jørð, mánað eftir mánað við bestu gróðrartíð, áir, haði gullið fløðir. Í fyrstuni slúktu vit tað bara fyri at liva. Nú liva vit bara fyri at slúka tað. Og hvat hava vit latið afturfyri annað enn eina einastu innpakking, ið er sleikt rein og tveitt burtur – eitt deytt hav, deyð luft og fleiri hundrað túsund fólk afturat koma stundi til at sleikja pappírið.«

Er konan senil, gomul og ørein?

Kortanei!

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: eirikur@sosialurin.fo

Blaðstjórn: Eirikur Lindenskov

Gróður og list

Frits Johannesen í Fuglafirði, sum hetta skúlaárið er á árskeiði á Danmarks Lærerhøjskole hugleiðir her eftir at hava verið á listaframsýning hjá Tróndi Patursson í Danmark

– Lít yvir firðir og sund ein heystardag, tá ið tað stendur við klettin og ljósrípur ringja seg um hamrar og skorar og tutla sínar smábønir í heystlittum kotum, tá sært tú landið í myndunum hjá Tróndi, hugleiðir Frits Johannesen

Frits Johannesen

Um eg eri góður miðjamaður, veit eg ikki. Kenni nøkur mið, plinkar og ýti í Djúpinum. Men tann sum fekk tað orðið á seg, at hann var góður miðjamaður, var mettur høgt millum manna. Nú er tað ikki beinleiðis plinkar ella mið í orðsins rætta týdningi, sum her verður hugsað um, men satt at siga hevur ikki so sjáldan verið ýtað av í seinastuni og farið hevur verið út í tann bláa listaliga fjørðin í høvuðsstaðnum í tí danska kongaríkinum. Um ikki annað, so havi eg vaskað øskuna av mær.

Her hevur verið ljómur í myndlist og tónleiki av lívrunnum evnum og ólívrunnum evnum, men alt hevur givið lív til tann livandi føroyska listaliga aldingarðin, og spurningurin hevur verið, hvar skalt tú leggja? – Lata snørið renna – ræsa ja, og kanska fáa eín í heimtan á einum góðum plinki millum Kastrupgaard og Rundatorn.

Ýtaði av og fór út á Kastrupgaard… einki er sum at fara út í Djúpini ein heystardag og leggja seg á rákaleið og kenna angan av sjórámа og sjósavu standa í nasarnar og lata sálini reinskast í feitum sjógvi. Síggja tindarnar í Kalsoynni reisa seg úr tí blágráa dýpinum, Kirkjugjógv skera í skýrákið um Borgina, Neystanga stevna út í Helludýpið og lata Góðadalsá bara møsna sítt møsn.

Nú nevndi eg Góðadalsá.

Pol Øre var ein listalig sál. Hevur við eini blýantstekning gjørt dyrgingarmannin ódeyðiligan. Góðadalsá litar tann trølsliga kleyvina, har Pol situr í keðiligum og kunnugum lívi í tí ævigа rennandi vatninum. Dyrgingarmaðurin situr í skutinum og er ritaður í myndina, sum ein ævig høggmynd. Hann er ikki ein torsu (høgmynd uttan, armar, bein og høvur), men eitt sprelllivandi mynd, sum hevur gloppað dyrnar til listina.

Frá barnsbeini hevur henda tekning runnið fram fyri meg. Henda blýantstekningin er ein ikon, sum letur upp, hevur verið eitt trin í tí listaligu menningini í Fuglafirði. Hetta kann tykjast at vera eitt sindur barnsligt at siga seg. Men hvussu mangar myndir hava ikki latið upp og broytt listina ella ment hana og latið hana í tign og skrúð?

Kastrupgaard hevur fyri stuttum havt framsýning við verkum av Oluf Høst-Bornholmaramálarinum. Tróndur Patursson er eisini ein oyggjabúgvi. Blaðað varð í listini hjá Tróndi Patursson og farið varð út á tað bláa dýpið og at kemba listliga medvitið í rótføroyskum íðum og íðukálvum í myndunum hjá Tróndi. Hoyra skvatlið av bráandi streymjaðarum simra um borðini á dyrgingarbátinum og hoyra langtandi gorri fara um firðir og sund á heimleið til reiðrið í setandi sól. Beitan var so skyggjandi í tí feita sjónum í glarstrokunum hjá Tróndi, at tað blágrøna, gulliga andlitið í landbrimininum rørdi seg í hyldligum strokum av einum livandi pensli uppi í tí grønu líðini í Kirkjubø, har sum Tróndur býr.

Lít yvir firðir og sund ein heystardag, tá ið tað stendur við klettin og ljósrípur ringja seg um hamrar og skorar og tutla sínar smábønir í heystlittum kotum, tá sært tú landið í myndunum hjá Trónda.

Lundasinan bølnar av morgunvætu í lundalandinum av feitum glaslittum døggperlum. Kingológini damla fram við landi, har runið í sjónum teskar hulisligt ljóð….. »à son aise« – eftir sínum egna høvdi - undir huldisligum lofti. Í runinum eru sjóssálmar, bønir teirra sjólætnu, boðabrot, óløgi og deyðir sjódrignir fiskimenn í ævigari vátari grøv fylgdir til teirra síðsta hvíldarstað av tungari sigaldu. Æviga vónin er í litunum, sum veitir glasinum lív, men glasið gevur eisini litunum lív. Lív er í glari.

Glarfitin bráar á hvøssum brandi, tá ið skorið verður í hagagott, turkað kjøt, og satt at siga eru myndirnar livandi. Glarfitin ger, at tað rennur vatn úr tonnunum.Skyggingin, sum tað hevur við sær, liggur sum ein bøn og hagføst.

Vandalititnir, svart og gult, boða frá, at tú kanst vera á eini vandaferð. Fagurligt er havið í logn, og fagrar eru skorar og líðir í blómandi summarsskrúð, men vandafult er havið, tá ið brimið stendur í grasið og hvør møl er huld í brimfroða í inn- og útsúði. Ikki at tala um, tá ið líðir og hamrar hava latið seg í glassstovu glerpípuskrúð.

Upphald er á fjøllum. Nú fer at tiðna, og glerpípur og skyggjuísur í skorum og homrum hava fingið deyðadóm sín, men í myndunum hjá Tróndi eru glerpípur, skyggjuísur og svartakálk ein livandi symfonisk yrking, sum onga enda tekur. Sjónin darrar av fyltum kenslum. Hugsa tær, hetta er í glastriligum búna.

gult19 cyan19 magenta19 svart19

UPPLIVILSI: Fyrrverandi stjørnuspælarin á 66-liðnum hjá KÍ er bitin av tennisítróttini og fyri kortum mól hann millum tennisstjørnur í Berlin. Tað var eitt upplivilsi fyri lívið, sigur John Sigurd Joensen

Millum tennisstjørnur í Berlin

John Sigurd Joensen hevði tennisbóltar við sær heim úr Berlin. Nakrir av fremstu kvinnuligu tennisspælarunum í heiminum hava sett sítt navn á bóltarnar

Eyðun Klakstein

Hann er best kendur sum fótbóltsspælari, men hann hevur fram um fótbóltin ein brennandi áhuga fyri tennisítróttini.

Tað hevði eisini við sær, at John Sigurd Joensen fyrr í mánaðinum leitaði sær til Berlin, har stór tenniskapping var. Og tað gjørdist eitt serstakt upplivilsi.

– Hetta er fyrstu ferð, at eg havi verið til eina tenniskapping, og tað var fantastiskt. Tað var eitt upplivilsi fyri lívið at verða til teir mongu dystirnar og eisini hitta fleiri av teimum kendastu spælarunum í heiminum, sigur John Sigurd Joensen.

Hann blaðar errin ígjøgnum myndirnar, sum hann tók á ferðini til Berlin, og har er sjón fyri søgn, at hann hevur hitt nógvar av teimum kendu kvinniligu spælarunum.

Hann hevur mynd av sær og Jennifer Capriati, sum er komin afturíaftur sum tennisspælari, eftir at hon var komin út á eitt persónligt síðuspor. Eisini aðrir tennisspælarar sum Suares, Schneider, Hingis og aðrar eru at síggja á myndunum.

– Tað var stuttligt at hitta hesar tennisspælarar og kunna staðfesta, at hetta eru púra vanlig og fyrikomandi fólk, sigur John Sigurd.

Gamal áhugi

Áhugin fyri tennis er ikki nýggjur hjá fyrrverandi stórspælaranum hjá KÍ.

– Tað byrjaði í tíðini, tá Bjørn Borg og teir gjørdu um seg. Og áhugin er framvegis stórur. Eg fylgi væl við í teimum ymisku kappingunum í sjónvarpinum, og tí var tað eisini stuttligt at sleppa til eina kapping sum hesa, sigur John Sigurd.

Berlin Open fyri kvinnur var ein undirhaldandi og lívlig kapping.

– Tað er líka so stuttligt at hyggja eftir tennis hjá kvinnum, tí ofta verður tað meiri spæl í slíkum dystum. Menninir serva ofta so hart, at tað kemur sjáldan rættiligt spæl í, sigur John Sigurd.

Ferðin til Berlin endaði eisini við, at John Sigurd kom í stóra blaðið Bild, sum greiddi lesarum sínum frá hýruvognsføraranum úr Føroyum, sum var komin allan vegin til Berlin at fylgja við í tenniskappingini

– Eina dagin eg fór at fáa mær at eta var sera trongligt við plássi. Eg fór til eitt borð, har tað sótu tveir menn, og setti meg hjá teimum. Tað vísti seg at verða ein journalistur hjá Bild og pápi hansara. Vit práttaðu saman, og hann vildi gjarna skriva eina stutta grein um meg, greiðir John Sigurd Joensen.

Og soleiðis endaði hann í blaðnum við milliónа upplagi.

Heilsan úr Berlin

Afturkomin til Føroya hevur John Sigurd hug at gera líknandi ferð aftur.

– Eg tími ikki at ferðast til summar og sól. Eg vil heldur hava okkurt sum hetta at fara til, tá eg fari av landinum. Eg var fyri nøkrum árum síðani í Nashville, og tað var eisini ein sera stuttlig ferð, sigur hann.

Í Berlin kom John Sigurd í samband við tveir lívverjar hjá heimsins besta kvinnuliga tennisspælara, Martinu Hingis, og teir vóru sera áhugaðir at hoyra um Føroyar. Teir fingu allar upplýsingar, sum teir høvdu fyri neyðini, og teir fóru eisini avstað við adressuni hjá John Sigurdi.

Í farnu viku fekk John Sigurd ein brævbjálva úr Berlin.

– Brævbjálvin var frá einum hotelli í Berlin, og eg skilti als einki av tí. Ikki fyrr enn eg lat brævbjálvan upp og fann eina persónliga heilsan frá Martinu Hingis í honum, greiðir hann frá.

Umframt tennis hevur John Sigurd eisini stóran áhuga fyri boksing, men hvussu er so við ítróttini, sum hann er kendur fyri at hava gjørt vart við seg í.

– Jú, fótbóltur kemur helst sum nummar trý í røðini, svara fyrrverandi landsliðsspælarin.



John Sigurd Joensen avmyndaður saman við kenda tennisspælaranum, Jennifer Capriati, undir Berlin Open fyrr í mánaðinum



Tá John Sigurd Joensen kom heimaftur til Klaksvíkar eftir Berlin Open, fekk hann eina óvæntaða persónliga heilsan sendandi frá heimsins besta kvinnuliga tennisspælara